

# Bert 1500 vikuskiftispass verða selda afturat

**Summar Festivalurin boðar nú frá, at bert 1500 vikuskiftispass afturat verða seld í forsølu til festivalin, sum verður hildin næsta vikuskiftið. Higartil hevur tað gingið strúkandi við søluni**

TÓNLEIKAFESTIVALUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Stóri festivalurin við teimum stóru útlendsku nøvnunum dregur framvegis fólk í túsundatali.

Forsølan av atgongumerkjum til Summar Festivalin hevur gingið so væl sum sjáldan, og nú boðar festivalurin frá, at í mesta lagi 1500 vikuskftispass verða seld afturat í forsølu. Samanlagt verða 8000 fólk loyvd inn á festivaløkið í ár, og tí ræður um at tryggja sær pláss, um ein vil hoyra Robin Gibb, Nik & Jay, ABBA The Show og nógv føroysk nøvn.

- Vit hava enn einaferð verið ótrúliga heppin við útlendsku tónleikanøvnunum. Robin Gibb er tann mest seljandi tónleikarin, sum nakrantíð hevur vitjað í Føroyum, og vit merkja, at sera stórur áhugi er fyri hansara konsert, har hann fer at spæla allar Bee Gees klassikararnar, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyriskiparunum av Summar Festivalinum.

### Ræður um at tryggja sær pláss

Forsølan av atgongumerkjum til Summar Festivalin hevur gingið sera væl, og nú er farið at tynnast í talinum av vikuskiftispassum, sum eru eftir at selja.

- Vit eru nú komin har til, at vit mugu boða frá, at vit síggja enda á forsøluni fyri framman, og vit selja bert 1500 vikuskiftispass afturat í ár, sigur Steintór Rasmussen.

- Vit vilja eisini tryggja okkum møguleikan, at selja eitt avmarkað tal av dagsbillettum við dyrnar, tí vit vita, at summi fólk eru í serligari støðu, at tey kanska ikki kunnu verða allan festivalin á tamb, og vit vilja geva teimum møguleikan at sleppa inn eisini, sigur hann.

- Men tað loysir seg sjálvsagt best at keypa vikuskiftispass, um tú veruliga ætlar tær á festival, men nú ræður um at reisa seg úr stólinum og tryggja sær pláss.